VIÐMERKINGAR

# »Gomorin« harra ráðharri !

**Hjalmar N. Poulsen**

Jøkulfell sakk umleið 60 fjórðingar í ein landnyrðing úr Kallinum. Syrgjuligu avleiðingarnar, sum vit øll yvirhøvur vita, førdu við sær at 6 sjómenn sjólótust.

Onki víðari kom fram í føroyskum fjølmiðlum í málinum, annað enn hvat sjófrágreiðingin staðfesti. Almenningurin sum so, hevur í góðari trúgv hildið, at hetta nú var eitt avsluttað kappittul. Men so var ikki, og vit skuldu vita betur, sum frá leið. Ein eftirmeting av hendingini sigur okkum, at Føroyska Sjálvbjargingarstøðin, tá ið á stóð, sveik so dyggiliga. At hetta eigur at fáa avleiðingar, er baði rætt og rímiligt.

Tað er tó forkastiligt at eitt slíkt mál skal koma fram í ljósmála, av berari tilvild, um man nú kann kalla tað so. Spurningurin er nú um nakað nakrantíð hevði komið framm í hesum máli, um ikki munnligi fyrispurningurin hjá Tobba bleiv borin framm í Løgtinginum.

Fiskimálaráðharrin sá mær eitt sindur lotur og nývaknaður út, tá hann gav ein slutur fyri ein slatur, í samrøðu síni við Jón Sigurd høskvøldið. Eg, - í hvussu so er, haldi at hann so dyggiliga hevur sovið í tímanum. Ella er hetta kanska ikki hansara málsøki? Hann átti sjálvsagt at handlað beinanvegin. Tá fyrsta eftirmetingin bleiv gjørd, átti hann at sett eina óhefta kanningarnevnd, til at lýsa málið, soleiðis at møguligt ábyrdarloysið bleiv staðfest og plasreað við tað sama. Ella í aðramátar allur ivi bleiv fyribeindur.

Tó so,- ein annar møguleiki fyriliggur.: Ráharrin hevur kanska ikki sovið í tímanum, men handlað í beráddum huga, fyri síðan at hopa uppá at málið bleiv gloymt. Um henda ætlan hansara hevði eydnast, hevði tað uttan yva komið væl við hjá onkrum. Spurningurin er um hetta ikki skuldi vera meiningin.

Tøkk fái tú Tórbjørn, fyri ikki at sova í tímanum, men vera vakin í so máta.

# Hví legðist landsstýrismaðurin á arbeiðsplássini hjá suðringum?

**Hergeir Nielsen**



Tað fer at vera at hálvum ári síðan, at Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, saman við øðrum samgongumonnum fór til Suðuroyar at bjóða út almenn arbeiðspláss á røktarøkinum.

Fortreytin fyri hesum arbeiðsplássum var eitt ellis- og røktarheim, og tað tykist draga út við einari loysn á hesum máli.

Miðað varð eftir einum 35 arbeiðsplássum, og ganga nú øll hesi mongu fólk bara og bíða eftir landsstýrismanninum, sum ikki sær seg føran fyri at stovna bara nøkur fá av teimum.

Tørvur er á náttarvaktum og økisterapi. Sjúkrasystrar, fysio- og ergoterapeutar ganga arbeiðsleysir, og stórur tørvur er á vanligum røktararbeiði sambært landsstýrismannium.

Hóast hesi arbeiðspláss saktans kunna mannast heima hjá fólki, sum hava tørv á røkt, so hendir snøgt sagt einki í Suðuroynni.

Økisterapi er sett á stovn í Havn og á Sandoynni, og náttarvakt í Eysturoynni, men einki í Suðuroynni.

Landsstýrismaðurin frávaldi at keypa hús til sinnisveik í Suðuroynni, har tørvurin var størstur. Hann valdi aðra loysn, sum ikki bøtti um tørvin har suðuri, og einki arbeiðspláss gav tann vegin.

Landsstýrismaðurin hevur tíverri eisini frávalt at skipa náttarvaktir og økisterapi í Suðuroynni, har tørvurin er stórur, og har nógvar tómar hendur eru tøkar.

Tey sum hildu, at landsstýrismaðurin og samgongan fyrst og fremst hugsaðu um arbeiðsloysi, tá ið teir bjóðaðu suðringum eitt ellis- og røktarheim til 35 starvsfólk, eru lumpaði so tað brakar í.

Tá landsstýrismaðurin á tingfundi onsdagin 2. mars varð spurdur, hví hann ikki skipaði fleiri størv, svaraði hann ma., at vit máttu skilja, at tað eisini var ein spurningur um pengar og fígging.

Vit, sum høvdu raðfest almennar útbyggingar, vistu sjálvandi, at høvuðsfortreytin fyri at byggja nýtt var eitt trygt fíggjarligt grundarlag. Tað tykjast samgongumenn nú skilja eisini.

Tey, sum hinvegin hildu, at landsstýrið hevði bæði pengar og fígging til 35 arbeiðsplásss og eitt nýtt ellis- og røktarheim í Vági, samstundis sum ein miðnámsskúli stóð í gerð, hava nú fingið okkurt at hugsa um?

Sjálvur fekk eg tað svarið, eg dyrgdi eftir, og vóni nú bara, at landsstýrið slær seg til tols við, at tað ikki eyðnaðist at lumpa suðringar í hesum umfari.

# Óneyðugur samanbrestur í fólkakirkjuni

**Niels Pauli Danielsen**
*sóknarprestur*
*Klakksvík*



Jóannis Fonsdal, hjálparprestur, hevur áskoðanina hjá teirri fólkakirkju, sum eg og nógv við mær vórðu doypt inn í. Tað er fedranna kirkju okkara og trúargrund hennara, sum Jóannis Fonsdal heldur seg til.

Vit eru nógv tey flestu, ið halda, at komnar eru nýggjar tíðir við nýggjum avbjóðingum og nýggjum hugsanum. Men trúargrundin skuldi verið hin sama og játtanaritini.

Tí mátti borið til at samstarva hjá okkum í fólkakirkjuni.

Og kunnu vit spyrja, hvat ið vit hvør í sínum lagi hava gjørt og gera fyri at fáa hetta samstarv at rigga. Hvat er gjørt fyri at forða fyri samanbrestum í kirkjuni?

**Ferðslureglur**
Fólkakirkja okkara er donsk. Sjálvt um vit ynskja at yvirtaka kirkjuna á føroyskar hendur, so er tó kirkja okkara framvegis í dag eins donsk og nøkur onnur donsk fólkakirkja. Og fólkakirkjuprestar okkara eru limir í danska prestafelagnum.

Fyri at verja samvitskufrælsið hjá prestum hevur javnstøðunevndin hjá danska prestafelagnum latið orða sokallaðar "ferðslureglur" til júst ta støðu, sum er við Havnar kirkju, har kvinnuligir og uppafturgiftir prestar og mótstøðumenn av hesum eru við **somu** kirkju. Hesar "ferðslureglur" skulu byrgja fyri, at samanbrestir henda. "Ferðslureglurnar" stóðu í prestafelagsblaðnum nr. 3 hin 18. januar 1991 og í Trúboðanum nr. 12 hin 18. juni 1998 í føroyskari týðing. Hvussu verða hesar reglur virdar í Føroyum? Hví verður ikki gingið eftir teimum? Tá hevði sloppist undan at komið í hesa støðuna, sum nú er við Havnar kirkju.

**Hondina í egnan barm**
Vit hava skyldu til hvør í sínum lagi at stinga hondina í egnan barm og spyrja og verða spurd, hvat ið vit sjálvi hava gjørt fyri at fáa samstarvið at rigga so væl sum gjørligt.

Hvat hevur biskupur gjørt ? Hvat hevur próstur gjørt? Hvat hava vit prestar gjørt? Hvat hava kirkjuráðini gjørt? Ja, her eigur at verða sagt, at kirkjuráðið við Havnar kirkju og formaðurin har hevur gjørt nakað, sum øll síggja, og tøkk skulu tey hava fyri tað. Men hvat hava vit onnur gjørt? Hvat hava kirkjutænararnir við Havnar kirkju gjørt, sum hava 4 prestar, men eru farnir út í bløðini og siga seg stuðla tveimum av teimum fýra, sjálvt um kirkjutænararnir als ongan myndugleika hava í tílíkum máli. Er tað ikki júst biskupur, sum í síni tíð mælti til, at sjúkrahúsprestturin skuldi hoyra til Havnar kirkju? Skulu bæði Jóannis Fonsdal og Sverri Steinhólm nú sigast upp? Teir halda seg báðir til tað, sum fedranna kirkja segði um kvinnuligar og uppafturgiftar prestar. Og Sverri Steinhólm hevur nú virkað við Havnar kirkju í meira enn 9 ár við hesi áskoðan uttan trupulleikar. Hvat er tað, sum kirkjutænararnir í yvirlýsing síni leggja upp til.

Hvat hevur føroyska prestafelagið gjørt? Hvat hava vit hvør í sínum lagi gjørt? Hava vit birt upp undir stríð og eggjað til stríð ella hava vit roynt at slætta sjógvin og fingið alt at rigga uttan samanbrestir? Ella hava vit púrt einki gjørt. Tann spurningin má hvør í sínum lagi seta sær í hesum døgum. Eitt er víst: Hetta, sum nú fer fram, tænir hvørki Guði ella monnum, fólkakirkjuni ella nøkrum øðrum.

**Løgin uppsøgn**
Er tað neyðugt at hava 2 sóknarprestar í altarringinum til altargongd við konfirmantum eina ella tvær ferðir um árið, tá ið ein prestur kann gera tað sum hjá okkum her í Klakksvík, og sum Jóannes Fonsdal gjørdi tað við ungdómsguðstænastuna í Havnar kirkju leygardagin(26.02), tá ið 400 fólk vóru til altars hjá honum og dekninum.

Eftir tilmæli frá biskupi er Jóannis Fonsdal í brævi frá kirkjumálaráðnum nú sagdur úr starvi, tí at hann heldur seg ikki kunna standa í altarringinum saman við kvinnuligum og uppafturgiftum presti, ið hann annars samstarvar sera væl við. Inntøkugrundarlagið er harvið skrykkt undan honum og familjuni, konuni og tveimum børnum við tí triðja á veg. Tey sita eftir við ongum. Tað er eingin stuttleiki. Tað er ikki til at flenna at.

**Biskupur**
Funnist verður at kirkjuráðunum. Er tað tí, at meirilutin í kirkjuráðnum við Havnar kirkju í hesum máli hevur stuðlað Jóannisi Fonsdal, sjálvt um tey ikki eru samd við honum.

Ført hevur verið fram, at kirkjuráðini hava spurt ov lítið, tá ið hjálparprestastarvið varð sett. Er tað ikki biskupur, sum sjálvur hevur leiðbeint kirkjuráðslimirnar um mannagongdina, tá ið prestur verður settur. Hann er við til fundirnar júst fyri at leiðbeina. Tað er hetta, hann fær løn síni fyri. Og er tað ikki biskupur, sum sjálvur fyri einum ári síðan hevur givið Jóannisi Fonsdal setanarbræv (kollats). Er tað biskupur, sum hevur svikið?

**Stuðul**
Tá ið vit sjálvir vóru ungir prestar, sum Jóannis Fonsdal er tað í dag, fingu vit góða hjálp og stóran stuðul frá táverandi varabispi og øðrum prestum. Hevur Jóannis og familja hansara fingið tað sama frá okkum øðrum? Hava vit øll svikið?

**Tøkk**
Persónliga fari eg her at takka Jóannisi Fonsdal og foreldrum hannsara, mammuni, sum er farin hiðani av foldum, og pápanum, sum í nógv ár hevur verið deknur á Skála og onkuntíð framvegis er tað, fyri ta trúgvu tænastu, tey gjøgnum eitt langt áramál hava gjørt í tí føroysku fólkakirkjuni bæði fyri børn og vaksin, eisini ta tíð ið eg var prestur teirra á Skála. Julia var ein framúrskarandi lærari í kristni og góðum fólkasiði, sum eisini okkara synir fingu stórt gagn av. Sanniliga fekk Jóannis Fonsdal ein góðan og tryggan uppvøkstur á Skála, sum er við til at gera hann til tað, sum hann er í dag.. Men henda viðferðin, ið Jóannis nú fær, og álopini á hann í bløðunum harma meg almikið og gera mær ógvuliga ilt. Vit mugu biðja Jesus vera við okkum og hjálpa okkum prestum, próstum og biskupi. Tað eru ørindi fyri Hann, vit eru kallað og vígd til at ganga og ikki bara fyri okkum sjálv.